**Fra:** Høgni Debes Joensen
**Sendt:** 21. januar 2011 15:00
**Til:** 'aksel.johannesen@hmr.fo'
**Emne:** Tilmæli frá Føðiskipanarnevndini

**Til Aksel V. Johannesen, landsstýrimann í heilsumálum**

Víst verður til tilmæli, ið áður eru sent landsstyrismanninum hin 24. februar og 4. mars 2010.

Nevndin hevði sín fyrsta fund hin 20. februar 2009. Í nevndini sita eftir avgerð Heilsumálaráðsins: Rannvá Christiansen, ljósmóðir, Eyðfríð Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, Fróði Joensen, yvirlækni, Høgni Debes Joensen, landslækni, Turið Petersen, kommunulækni, Heidi Bech Rasmussen, heilsufrøðingur, Steintora Samuelsen, yvirlækni, Sirið Stenberg, heilsufrøðingur og Pál Weihe, yvirlækni. (Kristianna Larsen á Lofti er skrivari.) Arbeiðið hjá nevndini er ikki skipað yvir eina avmarkaða tíð, men verður uppgávan hjá henni at seta seg inn í, hvørji tilmæli koma frá heilsustýrinum og út frá hesum gera faklig tilmæli til landsstýrismannin.

Fundirnir hava verið nýggju í tali higartil: 20. februar 2009, 17. juni 2009, 18. august 2009, 19. februar 2010, 5. mars 2010, 3. september 2010, 1. oktober 2010 og 22. oktober 2010. Á seinasta fundinum varð gjøgnumgongdin av "Anbefalinger for svangreomsorgen, Sundhedsstyrelsen 2009" (AFSS, sí viðheftu fílu) liðug.

Kapittlarnir í AFSS vóru býttir sundur ímillum limirnar, soleiðis at hesi hava staðið fyri og havt ábyrgd av tillagingum/viðmerkingum og tilmælum:

Fororð, Kapittul 1 og Kapittul 2: Høgni Debes Joensen
Kapittul 3: Steintóra Samuelsen og Turið Petersen
Kapittul 4: Eyðfríð Jacobsen og Rannvá Christiansen
Kapittul 5: Sirið Steenberg og Heidi Bech Rasmussen
Kapittul 6: Pál Weihe
Kapittul 7, 8, 9, 10 og 11: Steintóra Samuelsen
Kapittul 12 og 13: Rannvá Christiansen og Eyðfríð Jacobsen
Kapittul 14: Fróði Joensen, Sirið Steenberg og Heidi Bech Rasmussen
Kapittul 15: Rannvá Christiansen, Sirið Steenberg og Heidi Bech Rasmussen
Kapittul 16: Eyðfríð Jacobsen, Rannvá Christiansen, Sirið Steenberg og Heidi Bech Rasmussen
Kapittul 17: Høgni Debes Joensen

Tey, ið fingu ábyrgdina av kapittlunum, valdu sjálvi, hvussu tey vildu arbeiða við tillagingum og tilmælum. Nøkur valdu at skriva allan kapittlin á føroyskum við tillagingum, meðan onnur gjørdi viðmerkingar og tilmæli í mun til donsku kapittlini. Tilmælini niðanfyri eru í samsvari við nevnda tilfar og eru einmælt samtykt av nevndini.

Fororð, Kapittul 1 (Lógargrundarlagið og aðrar ásetingar), Kapittul 2 (Bakgrund og aðalmál fyri viðgonguskipanini) og Kapittul 6 (Lívsháttur í viðgongutíðini), eru áður send við brævinum dagfest 24. februar 2010.

Samlaða tilmælið verður við hesum sent landsstýrimanninum í heilsumálum við viðheftu fílu.

Vinarliga

Vegna Føðiskipanarnevndina hin 21. januar 2011

Høgni Debes Joensen
formaður